Jóhannis Joensen
løgtingsmaður

Nr. 58/2019

Fyrispurningur eftir Tingskipanini §52 a

Fyrispurningur viðvíkjandi rættinum til at arbeiða fulla tíð, settur landsstýrismanninum í umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS §52 a).

Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at tryggja starvsfólki hjá tí almenna rættin til at arbeiða fulla tíð?

Viðmerkingar:
Heilsuhjálparar og heilsurøktarar eru í stóran mun í starvi hjá tí almenna – annaðhvørt hjá landi ella kommunum. Ein stórur partur av hesum fakbólkum eru kvinnur, og ein stórur partur arbeiðir niðursetta tíð. Meðan summi vilja arbeiða niðursetta tíð, eru tað onnur, sum gera tað, tí at tey ikki hava møguleika til annað. Flestu størv, sum verða lýst leys á hesum økinum, verða lýst sum parttíðarstørv. Tað hevur við sær, at vit í dag hava nógvar faklærdar heilsuhjálparar og heilsurøktarar, sum mugu átaka sær hjástørv, t.d. vaskistørv, fyri at fáa endarnar at røkka saman. Arbeiðsloysið í Føroyum er metlágt, og tað er stórur tørvur á fólki á umsorganarøkinum. Tí kann tað tykjast sum ein andsøgn, at faklærd starvsfólk á økinum ikki sleppa at arbeiða fulla tíð.

Tað er somuleiðis ein sannroynd, at hesir fakbólkar teljast millum tey lægst løntu í okkara samfelag. Við einum parttíðarstarvi verður lívsinntøkan og harvið pensjónsuppsparingin eisini lægri. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 21. februar 2020

Jóhannis Joensen